# Føroyingar ganga undan í Íslandi

**Fyrsti serbygdi alibáturin í Íslandi nakrantíð varð flotaður á Eiði í vikuni. Hann fer til íslands við farmaskipi um vikuskiftið**

SKIPASMÍÐ
*Edvard Joensen*

**Eiði:** Á Eiði hava tey smíðað fyrsta serbygda alibátin til íslendska alivinnu nakrantíð. Úrslitið er so mikið gott, at tað longu hevur havt fleiri seriøsar fyrispurningar við sær.

Tað er mestsum ein sensatión, Hydro-Tech á Eiði letur frá sær um dagarnar. Tað er tvíkiljan Svalan, sum er smíðað á Eiði til eitt alibrúk á Mjóvafirði millum Seyðisfjørð og Norðfjørðin á Eysturlandinum í Íslandi.

Nú er einki sjáldsamt í tí, at ein tvíkilja verður flotað á Eiði. Tí Hydro-Tech hevur smíðað nógvar tvikiljur til alivinnuna. Men ikki til Íslands. Og báturin er gjørdur at kalla allur sum hann er á Eiði. Motorar, nautiska- og elútgerð umframt kranan á dekkinum hava teir flutt inn. Men spæl, koppar og fóðurkanón eru gjørd á Eiði, sigur Jóannes Mørkøre á Tydro-Tech.

El-arbeiðið upp á bátin hevur Petur Frank Joensen, elektrikari á Eiði gjørt. Og Jón Jacobsen, timburmeistari á Eiði, hevur gjørt alt timburarbeiðið.

Báturin er knappar 12 metrar langur og seks metrar breiður. Hann er útgjørdur við tveimum motoruum. Við 185 hestakreftum í hvørjum kjøli, sigur Jóannes Mørkøre. Motorarnir eru av merkinum Iveco, sum KJ-Hydraulik á Kambsdali, sum eigur Hydro-Tech, umboðar.

Báturin, sum kostar tríggjar milliónir føroyskar krónur, verður avskipaður við farmaskipi til Íslands seinni í vikuni. Íslendingar syrgja sjálvir fyri flutninginum. Hydro-Tech letur teimum bátin í Havn. Hann er góðkendur av íslendska skipaefirlitinum og lýkur øll krøv, sett verða.

Jóannes Mørkøre sigur, at teir hava vónir um, at alibáturn Svalan ikki verður nøkur einlig svala kortini.

So mikið er Hydro-Tech longu kent í Íslandi, at einir tveir rættiliga seriøsir fyrispurningar um at gera líknandi bátar til íslndskar toskaalarar eru komnir, sigur hann. Tó er eingin sáttmáli undirskrivaður enn.

Eisini eru íslendingar áhugaðir í aliringum frá Hydro-Tech, sum eisini selir rættiliga nógv alibesløg til Íslands.

Svalan er fyrsti serbygdi alinbátur í íslandi. Aðrir alibátar, íslendingar hava brúkt, eru plastikbátar, sum vanliga eru gjørdir til fiskiskap, sigur Jóannes Mørkøre.



*Tvíkiljan Svalan, sum er alibátur til íslendskt alifelag á Eysturlandinum, varð flotað á Eiði í vikuni. Hetta er fyrsta stálskipið, føroyingar hava latið til Íslands, og samstundis fyrsti serbygdi alibátur til íslendingar yvrihøvur*

*Mynd: Jóannes Mørkøre*




# PiffPaffPuff flytur

**Serhandilin við barnaklæðum í Sandavági hevur brúk fyri størri hølum og flytir um vikuskiftið**

HANDILSVINNA
*Edvard Joensen*

**Sandavági:** Nøkur ekslusiv merki. Ikki ov nógv av hvørjum vørunummari og ein rímiliga fastan kundaskara. So ber eisini til at selja barnaklæði um alt landið.

Tað staðfestir Birita Petersen, sum hevur handilin Piff Paff Puff í Sandavági, sum selur barnaklæði og innbúgv til eitt nú barnarúm.

Í tíðindaskrivi sigur hon, at handilin hevur síðan hann byrjaði hildið til í kjallaranum hjá blómubúðini Dáanum í Sandavági, men víðkar nú og flytir í størri høli í Sandavági. Har handil og kiosk í áravís hava verið. Fyrst fyri, tá komið verður til Sandavágs og tískil lættari at finna, sigur Birita Petersen.

Birita Petersen byrjaði fyri umleið hálvum øðrum ári síðan serligan handil við barnaklæðum. Handilin hevur høli í Sandavági, men selur um alt landið. Á internetinum og við at ferðast kring landið og selja á sonevndum «home-party» og famsýningum.

Birita Petersen sigur, at tað ræður um at hava góðar vørur og ikki fleiri av hvørjum slag. Tí fólk vilja fegin gjalda fyri at fara til jólatræ við barninum uttan at síggja eini fimm-seks onnur børn ganga í sama kjóla ella jakka.

Hon sigur, at hon nú fer at víðka um tilboðini til kundarnar. Somu kendu merkini, hon hevur havt, verða framvegis at fáa, men okkurt kemur afturat, sigur hon. Eitt nú fer PiffPaffPuff at selja merkið Okker-Gokker.

Eisini fer hon at hava heldur meira av kamarsinnbúgvi, seingjarklæðum og tílíkum, sum ikki beinleiðis eru klæði at lata seg í.

Sum nakað nýtt fer PiffPaffPuff eisini at hava eitt sindur av vaksnamannaklæðum, nú hølisviðurskiftini verða til tað, sigur Birita Petersen.

Flutt verður í nýggju hølini um vikuskiftið, og latið verður upp leygarmorgunin klokkan 10.00, og opið er til kokkan 17.00.

# Sparikassin byggir út í Miðvági

**Deildin hjá Føroya Sparikassa í Miðvági verður bygd út. Tað skal gerast bæði arbeiðsligari og meira kundavinarligt at koma í Sparikassan, sigur deildarleiðarin**

ÚTBYGGING
*Edvard Joensen*

**Miðvági:** Føroya Sparikassi byggir út í Miðvági. Umstøðurnar vóru ikki tíðarhóskandi.

Tað verður grivið uttan fyri sparikassahúsini í Miðvági. Sjálvtøkan stendur enn á sama stað, men avgreiðslan sær heldur óbygd út í løtuni.

Tað hevur sína grund, tí meðan arbeitt verður millum báðar bygningarnar niðan fyri vegin, er avgreiðslan flutt niðan um vegin, í gamla handilin hjá Godtfredi Joensen, at vera.



*Deildin hjá Føroya Sparikassa í Miðvági verður umvæld og mestusm gjørd av nýggjum. Eystari bygningurin verðu longdur níggju metrar, og tann vestari, sum í dag hýsir sjálvtøkuni, verður tikin niður*

*Mynd: Edvard Joensen*

Sjúrður Poulsen, deildarleiðari hjá Føroya Sparikassa í Vágum, sigur, at neyðugt var at byggja út í Miðvági nú. Deildin er høvuðsdeildin í oynni, og har vóru stutt og greitt ov ringar arbeiðsumstøður. Tey fylgdu ikki við tíðini longur, sigur hann.

Bygt verður upp í skrivstovubygningin. Talan verður um eina lon, sum verður longd níggju metrar vestureftir. Sjálvtøkan, sum í dag er í einum bygningi fyri seg, verður flutt í hin bygningin, og tann, har hon í dag er, verður niðurtikin.

Bygt verður soleiðsi, at tað fer at bera til at brúka kjallaran eisini, sigur Sjúrður Poulsen. Eisini verður bygningurin gjørdur brúkaravinarligur. Eitt nú fer eftir umbyggingina at bera til at sleppa inn við koyristóli, sum ikki letur seg gera í dag.

Inni verður alt gjørt av nýggjum, og serliga leggur deildarleiðarin dent á, at eitt nú umstøðurnar til kundaráðgeving fara at verða munandi betri enn í dag, tá liðugt er.

Sjúrður Poulsen sigur, at tey vænta at vera liðug við umbyggingina til ólavsøku. Hana ætlar hann at kunna halda niðan fyri vegin aftur, sigur hann.



# Jaspis og Ametyst rokast øgiligt

**Seinastu 14 dagarnar hava skipini verið inni við fullari last fýra ferðir!**

ROKFISKISKAPUR
*Vilmund Jacobsen*



*Prísurin á tí smáa upsanum er lækkaður nakað í seinastuni, meðan prísurin á tí frægara fiskinum heldur sær*

Trolararnir, sum royna eftir upsa, fáa nógvan fisk.

Hetta er einki nýtt, tí fiskiskapurin hjá trolarunum hevur verið góður í longri tíð.

Men nú ber av...

Trolararnir, Jaspis og Ametyst, sum vóru leingi úr vinnu í fjør, tí teir vórðu sandblástir og nútímansgjørdir, hava gjørt tað óføra væl, síðan teir komu aftur úr Danmark.

Ikki minst seinastu tíðina hava teir rættiliga rokast.

### 4 ferðir í 14 dagar

Virkisleiðarin á Fiskavirking í Saltangará, Jason Johannesen, ásannar, at hann í síni longu tíð, sum virkisleiðari og stjóri á fiskavirkjum, neyvan veit um slíkan fiskiskap at siga.

- Jaspis og Ametyst vóru inni mánadagin í hesi vikuni, fullir undir lúkurnar, og longu hósdagin vóru teir inni aftur – skítfullir, sum hann tekur til.

Jason sigur, at skipini hava landað fýra ferðir seinastu 14 dagarnar, og lastin hevur verið á tremur hvørja ferð.

- Úr minninum veit eg, at teir landaðu, 19. februar, 24. februar og nú aftur, 27. februar.

Í gjár høvdu Jaspis og Ametyst eini 200.000 pund av upsa og eini

30.000 pund av øðrum fiskasløgum.

Fiskavirking í Saltangará, sum í hesum førinum keypti allan upsan frá báðum skipunum, landaði annað skipið, og Snodd á Toftum landaði hitt.

Seinasta leygardag keypti Fiskavirking í Saltangará út við 40.000 pund av upsa frá Smaragd og Safir. Annar landaði á Snodd, hin í Hvalba.

### Prísurin lækkaður

Jason Johannesen sigur, at upsin framvegis er smáur, hóast tað gongur ímóti gýtingartíð.

- Vit plagdu at siga, at vanligur, men ikki stórur upsi, lá um 2,2-2,3 kg., men tað mesta, vit fáa í dag, liggur um 1,6-1,7 kg. So, hetta er rættiliga smáur fiskur, sum tekur langa tíð at arbeiða.

Av tí, at fiskurin er smáur, sigur hann, so gongur tað eisini út yvir dygdina á vøruni.

- Talið av fiski er stórt, og tað tekur sína tíð at arbeiða eina stóra last undan, sigur Jason Johannesen.

Hann vísir á, at prísirnir á tí smáa upsanum eru lækkaðir nakað í seinastuni, meðan prísurin á tí frægara fiskinum heldur sær.

- Alt hevði verið øðrvísi, um fiskurin var størri, sigur virkisleiðarin á Fiskavirking í Saltangará.

# Eisini nóg mikið at takast við í Miðvági




*Vesturtúgvan hevur landað í Miðvági í vikuni*

FISKIVINNA
*Vilmund Jacobsen*

Á virkinum hjá Fiskavirking í Miðvági hava tey eisini nóg mikið at takast við, nú fiskiskapurin hjá trolarunum er so góður.

Meginparturin av fiskinum, sum virkið arbeiðir, verður keyptur á uppboðssølu. Fiskurin verður koyrdur í Vágarnar, og nú undirsjóvartunnilin er komin, er eingin bíðitíð longur.

Virkið landar eisini okkurt skip av og á, og í vikuni hevur Vesturtúgvan landað í Miðvági.

Á skrivstovuni vóru tey ikki greið yvir, hvussu nógv skipið hevði, tá ið vit frættu hósmorgunin.

- Her er nógv fiskaarbeiði hvønn tann einasta dag, siga tey í Miðvági.

Virkisleiðarin, Albert Ellefsen, er uttanlands.

# Fimm trolarar landað á Sandi



*Bæði á virkinum á Sandi og í Skopun hava tey havt úr at gera alla hesa vikuna*

FISKISKAPUR
*Vilmund Jacobsen*

Á virkjunum hjá Sandoy Seafood í Sandoynni hava tey havt úr at gera í longri tíð, og hendan vikan er einki undantak í so máta.

Ikki færri enn 5 trolarar hava lagt veiðina upp á Sandi í vikuni, og bæði á virkinum á Sandi og í Skopun standa tey uppundir hendur í fiski, sum tikið plagar at vera vil.

Mánadagin landaðu Research og Skansatangi smá 100.000 pund, harav meginparturin av veiðini var hvítur fiskur.

Mikudagin vóru Kolumbus og Nornagestur inni; teir høvdu eini 300.000 pund, meginparturin upsi.

Tá ið vit frættu av Sandi hósdagin, var Eysturbúgvin eisini inni við fullum skipi, helst yvir 200.000 pundum, meginparturin upsi.